# Vit noyðast at fylgja reglunum



*Vit mugu fylgja reglunum og viðgera allar umsóknir eins, sigur Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri*

**Tað var eingin trupulleiki við fiskiloyvinum til Sunbeam fyrr ennn eigararnir skiftu meining, og vildu hava Sancy úr flotanum heldur enn Roc Amadour. Men Sancy hevur ov lítla veiðiorku, og tí kann fiskiloyvi ikki flytast, sigur Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri**

FISKILOYVI
*Lleo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit verða noydd til at viðgera allar umsóknir eins. Og tá veiðiorkan á einum nýggjum skipi er størri enn á tí gamla, loyvir lógin stutt sagt ikki eini flyting av fiskiloyvinum. So einfalt er tað.

Bjørn Kalsø kennir væl til hetta dømi við Sancy og Sunbeam, men hann vísir á, at eigararnir upprunaliga søktu um og fingu loyvi til at skifta Roc Amadour út við Sunbeam.

- Í tí førinum var eingin trupulleiki, tí har var avlops veiðiorka. Trupulleikin uppstóð, tá eigararnir skiftu meining og heldur vildu skifta Sancy út við Sunbeam, sigur Bjørn Kalsø.

Hans í Líðini vísti í blaðnum fyrr í vikuni á, at munurin á samanløgdu veiðiorkuni hjá Sancy og Topas og so nýggja skipið Sunbeam var bert 4,5%. Men hettta er ein útrokning, sum er »best case scenario«. Tí í hesi útrokningini verður roknað við gomlu Sancy, sum hevði 300 hesta størri maskinu enn nýggja Sancy, og hartil verður roknað við plomberaðu maskinorkuni á Sunbeam.

Til tað fyrra hevur Bjørn Kalsø ongar viðmerkingar, men til plomberaðu maskinorkuna sigur fiskimálaráðharrin, at plomberaðir motorar verða ikki góðtiknir. Og tí verður uppruna maskinorkan nýtt í útrokningargrundarlagnum.

## Tillagingar neyðugar

Hinvegin er fiskimálaráðharrin ikki avvísandi, tá tað kemur til at gera tillagingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

- Reglurnar eru sera greiðar at fylgja. Um tær eisini eru nóg góðar, er so ein annar spurningur, sigur Bjørn Kalsø.

Hann er væl vitandi um, at stór menning alla tíðina er innan so at siga øll øki innan skip og veiðitól. Og tí er heldur ikki vist, at útrokningarhátturin í dag er hin rætti.

- Gear, skrúvutoy og dysur eru í støðugari menning, og tí er tað rætt, at tað ikki neyðturviliga er maskinorkan, ið er avgerandi fyri veiðiorkuna. Tí royna vit eisini alla tíðina at hava eyguni við menningini innan økið, sigur Bjørn Kalsø.

Fiskimálaráðharrin metir tí, at tað verður neyðugt við ávísum tillagingum, men hinvegin mugu hesar fremjast við atliti at teimum avleiðingum, ið kunnu standast av.

Men viðvíkjandi konkreta málinum um Sunbeam sigur Bjørn Kalsø, at tað ikki ber Fiskimálaráðnum til at ganga umsóknini á møti, sum hon fyriliggur í løtuni.

Lesið eisini viðmerkingarnar á síðu 7.


## Bólkaleiðari og IP- og teletøkningar til Vinnutøkni

"Tá ið nýggj tøkni kemur rullandi, eru vit annaðhvørt partur av trumluni ella partur av vegnum"

- Steward Brand -



Føroya Tele er fremsta KST-fyritøka í Føroyum. Vinnutøkni myndar, saman við Teletøkni og Datatøkni, Rakstrardepilin, sum er tann parturin av FT Samskifti, ið hevur ábyrgd av øllum tøkniligum loysnum. Vinnutøkni hevur ábyrgd av øllum telefoni- og øðrum samskiftisloysnum til okkara vinnukundar.

Fyri at styrkja um tøkniliga samstarvið við vinnukundar okkara, sóknast vit eftir bólkaleiðara og IP- og teletøkningum, ið saman við okkara dugnaligu vinnutøknikarum skulu mynda Vinnutøkni framyvir.

**Felags fyri størvini er, at nýggju starvsfólkini**
- mugu duga væl at samstarva, arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd
- eru nærløgd og samstarvsfús
- eru fyrikomandi, og duga væl at tosa við kundar
- halda avtalur mótvegis kundum
- hava góðan kunnleika til enskt

**Bólkaleiðari**
Bólkaleiðarin fær ábyrgdina av starvsfólka- og fíggjarviðurskiftunum á Vinnutøkni, umframt at tryggja kundanøgdsemið.

**Arbeiðsinnihaldið er í høvuðsheitum:**
- yvirskipað samskipan av verkætlanum og starvsfólkaleiðsla
- at vera við til at leggja framtíðar ætlanir fyri nýggj vinnuprodukt hjá Føroya Tele

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving, ein ávísan tøkniligan kunnleika og áhuga fyri tøkniligum heildarloysnum.

Umsøkjarar við royndum innan leiðslu og kundarøkt hava fyrimun.

**IP & teletøkningar**
Í samstarvi við hinar tøkningarnar í Vinnutøknibólkinum, skulu nýggju IP-tøkningarnir veita, reka og viðlíkahalda telefoniskipanir og IP-telefoniloysnir og tilhoyrandi nýtsluskipanir hjá kundum okkara.
Umsøkjarar skulu vera telduatstøðingar ella hava aðra viðkomandi útbúgving, og umsøkjarar við royndum innan IP-telefoni og SIP hava fyrimun.

Vit bjóða eitt starv við góðum møguleikum fyri víðariútbúgving, í einum framtakshugaðum og mennandi umhvørvi.

Neyvari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hjallgrím P. Hentze, depilsleiðara á tel 303401

Størvini verða lønt sambært avvarandi sáttmála.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 13. august 2007 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn
ft@ft.fo

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!